# kshøll






Í ár helt Sjúrður Skaale hin "skeiva fyrilesturin". Hinir fyrilestrarhaldararnir vóru Pól Huus Sólstein, Petur Steingrund og Atli Gregersen




Viberg Sørensen og hansara menn í Reiðarafelagnum hava havt arbeiðsfund við Gjógv
Mynd: Vilmund Jacobsen

# Reiðarafelagið hevur arbeiðs-fund við Gjógv

**FUNDARVIRKSEMI** Nevndin í Føroya Reiðarafelag hevur síðan í gjár sitið á arbeiðsfundi við Gjógv. Viberg Sørensen sigur, at hetta er ein fundur, har nógv ymisk felags viðurskifti verða umrødd

Vilmund Jacobsen

Í gjár og fram til middags í dag hava átta nevndarlimir í Føroya Reiðarafelag verið á arbeiðsfundi á Gjáargarði.

Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum, sigur, at talan er ikki um nakað ávíst mál fram um onnur, sum limirnir í felagnum umrøða, men at talan er um eina gjøgnumgongd og umrøðu av nógvum ymiskum málum og viðurskiftum við atliti til felags viðurskifti.

– Hetta er ein innanhýsis arbeiðsfundur, og tað verður eingin almenn fráboðan skrivað eftir fundin, leggur hann aftrat.

Føroya Reiðarafelag hevur annars sagt allar sáttmálar við manningarfeløgini upp eftir galdandi freistum, men Viberg Sørensen sigur, at arbeiðsfundurin hevði verið hildin kortini.

Sáttmálin við Føroya Fiskimannafelag gongur út hin 1. desember í ár, og sáttmálarnir við ávikavist Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið ganga út 1. januar í 2011.

vilmund@sosialurin.fo

# Tyngjandi eyka avgjald kemur sera dátt við

**OLJUAVGJALD** Ein stórur partur av føroyska fiskiflotanum gongur ikki væl, og tí kemur tað sera dátt við hjá Reiðarafelagnum, at landsstýrið nú ætlar at leggja eyka avgjald á bunkringarolju

Vilmund Jacobsen

Miðskeiðis í hesi vikuni var Føroya Reiðarafelag á fundi við Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharra. Fundurin snúði seg um trygdargrunnin, sum skal avloysa verandi skipan við minstuløn.

Viberg Sørensen sigur, at eftir sum felagið fekk høvi at hitta fíggjarmálaráðharran, kom eyka oljuavgjaldið á 10 oyru fyri liturin, sum ætlandi skal áleggjast øllum sum brúka olju, upp at venda.

– Hetta var slett ikki eitt mál á fundinum, men vit nýttu høvi at vísa fíggjarmálaráðharranum á miðaltøl fyri nakrar skipabólkar, nú vit høvdu hetta høvi.

Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum, sigur, at tølini yvir ein miðal lemmatrolara, miðal partrolara og eitt miðal línuskip avgjørt ikki eru góð.

– Tølini vísa nevniliga, at hesir skipabólkar hanga við reyvini, og tí fer eitt møguligt eyka oljuavgjald at koma sera dátt við, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag.

vilmund@sosialurin.fo